## HEILSANIR



**Góða mamma, vermamma og omma**
Hjartaliga tillukku við teim hálvt hundrað árunum. Tú er tann besta. Vit elska teg.
**Sámal Hanne & Krista, Jóhan Vilhelm og Jonna v/ fam.**



**Góði, elskaði abbi!**
Hjartaliga tillukku við 65 ára degnum 22. okt. Takk fyri alt tú ert fyri okkum.
**Kærar heilsanir frá John, Signhild S., Eliesar og Solveig**



Vit vilja hjartaliga takka øllum, sum á ymiskan hátt vóru við til at gera hjúnabandsdag okkara 28/7-2001 ógloymandi. Takk fyri blómur, fjarrit og gávur.
**Kára og Jes**



**Góði Mortan og abbin**
Hjartaliga tillukku við føðingardøgunum 19. og 21. okt. ynskja
**Marin, Maria og Anja**



**Góði Adrian**
Hjartaliga tillukku við 3 ára degnum í dag. Love you.
**Heilsan, mamma & Magni babba**



**Góði Addi**
Hjartaliga tillukku við 25 ára føðingardegnum 22. oktober. Tíverri kunna vit ikki koma í føðingardag. Alt tað besta í framtíðini.
**ynskja vit 3 á Høgabø**



**Góði Addi**
Hjartaliga tillukku við 25 ára degnum 22. okt. Vit gleða okkum at koma í føðingardag í Ålborg
**Heilsan frá okkum í Hune**



**Góða Annika**
Hjartaliga tillukku við 18 ára degnum 23. okt. Jesus pápi signi teg í framtíðini.
**Heilsan, mamma og babba**



**Góða Annika systir**
Her er ein heilsan frá beiggja tínum úr Kbh. Vit ynskja tær tillukku við teimum 18 árunum. Síggjast á jólum.
**Heilsan, Jan og Høgni**

---

**Heilsanir** — 30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:.......................................................................
...................................................................................
...................................................................................
...................................................................................
...................................................................................
...................................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .........................................................................
Bústaður: ...................................................................
Bygd/býur: .................................... Tlf.: .................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »Heilsanir«

---



# Bilførarin ábyrgd av lyktunum

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo



TÍÐINDASKRIV

Tað er rætt og slætt vandamikið, at bilar koyra við ljósum, sum ikki eru í lagi. Endamálið við tiltakinum "Lyktakanning" er stutt og greitt at fáa hvønn einstakan bilførara at steðga á og kanna viðurskiftini. Tað skal ikki nógv meira til enn at ganga eina ferð rundan um bilin og hyggja eftir, um øll ljósini lýsa, sum tey eiga. Best er at vera tvey um uppgávuna: annað situr í bilinum og tendrar fjarljósini, blunkljósini og bakkiljósini og traðkar á bremsuna, so bremsuljósini lýsa.

Kanningarseðilin, sum verður útflýggjaður, tá ið tú keypir bensin ella olju, er ætlaður sum "kekklisti", tá ið hetta verður gjørt.

Finnur tú brek, má tað sjálvandi verða rættað!

Lýsir onkur pera ikki, má sjálvandi nýggj setast í. Er t.d. nærljósið øðrumegin farið, er best at skifta út hinumegin eisini, annars verður munur á ljósstyrkini, og tað kann elva til ótryggleika.

Tað er ikki altíð, at tað er peran, sum er farin. Mangan stavar brekið frá vánaligum elektriskum sambandi vegna rust ella irr. Um tað ikki hjálpir at skava og reinsa, er neyðugt at fara á verkstað, har kønar hendur kunnu rætta brekið.

### Kanningarseðilin

Tá ið tú keypir bensin ella olju í vikunum, tá ið lyktakanningin er, fært tú ein kanningarseðil útflýggjaðan. Á hesum seðili eru 8 spurningar um ljós. Tá ið tú kanst seta kross í allar kassarnar, er kanningin liðug fyri títt viðkomandi, og tú kanst lata seðilin inn aftur á eina bensinsølustøð hjá Statoil ella Shell.

### Lyktakanningin og politiið

Lyktakanningin er í veruleikanum í tveimum pørtum. Fyrri parturin er upplýsingarátakið, meðan hin seinni er eftirkanningin, sum politiið tekur sær av. Fyrstu vikurnar í november verður serligt átak at kanna bilar.

### Vinn ein tanga av bensini ella olju.

Drigið verður ímillum innkomnu seðlarnar um at vinna áfyllingar av bensini ella olju á kr. 300,- . Seinasta freist at lata svarseðilin inn er mánadagin 5. november 2001 - (og ikki 30. okober 2000, sum tað stendur á kanningarseðilinum). Tjúgu vinningar verða latnir, og Shell og Statoil lata helvtina hvør. Drigið verður fríggjadagin 16. november 2001.










Lesið Sosialurin -tað loysir seg